# Suðuroyggin og tunnlarnir her

JOHAN DAHL
løgtingsmaður



Nú í tosað verður um samferðslukervið á meginøkinum og tunnlar sum kostað tætt at milliardini at gera og sum skulu verða sjálvfiggjandi, - so er hetta nakað sum ber til í meginøkinum orsakað av ferðslutíttleikanum og mongdini av bilum og flutningsaktivitetinum sum allur er konsentreraður um Skálafjørðin og Kollafjørð /Tórshavn.

Næsta stóra ætlaða almenna projektið er Sandoyartunnilin sum kemur at knýta Sandoynna til meginøkið.

Tá hendan ætlan er framd er Suðuroyggin einasta stóra oyggj, sum ikki er samanbundin við restina av meginlandinum og tí krevst eisini at hon virkar sum ein sjálvstøðug eind í Føroyum og at alt infrakervið og umstøðurnar at livað og virkað eru eins góðar og í restini av landinum – ella kanska betur fyri at fáa fólk at trívast.

At Suðuroyggin endiliga, eftir tos um hetta í nógv ár er í gongd við tunnilin millum Øravík og Hov er gott fyri oynnað og fólkið og kemur at léttað munandi hjá mongum at sleppa undan at koyra um hovseggina til og frá arbeiði. Fyri flutning við tungum góðsi er hetta eisini ein ótrúlig forbetring og tryggleiki tað at sleppa undan hovsegg. .

At Hovstunnilin verður gjørdur skal ikki verða einstýðandi við at nú er liðugt at gera tunnlar í suðri og at suðringar nú hava fingið nokk, enn er langt á mál. Sí talvu.

Politikarar sum hava verið valdir í oynnið ígjøgnum ártíggjir, hava til hvørt einasta val lovað at nú skuldi Fámjinstunnilin gerast, men ak - hvørja ferð stemmunar eru taldar so er tunnilin eisini gloymdur – til næsta val so kemur hann úr aftur mjølposanum.

Tó skal sigast at nakrar fáar hundrað túsund hava verið játtaðar til borikanningar,- ilt var annað!!

Hesin tunnil er líka umráðandi fyri yvirlivilsi hjá Fámjin og at fáa ungdóm og familjur at støðast og festa búgv har, sum Sandoyartunnilin er fyri Sandoynna og fólkið har, tað eiga vit ikki at gloyma.

Tað eru gjørdar 3 alternativar linjuføringar til hendan tunnil uppá ávíkavist 564 m, 769 m og 897 m undir Øravíksskarði.

Tann prísur sum er nevndur og sum er ávirkaður av um alternativ. 1 ,2 ella 3 verður tikið millum 38 og 48 mill fyri liðugan tunnil og millum 31 og 38 mill fyri parvís lidnan tunnil. .

**ØLL ÚTGERÐIN NÆRMAST À STAÐNUM**

Nú meðan øll útgerðin hjá Ístak er á staðnum og er arbeiðsstøðin fáar minuttir frá staðnum har linjuføring til hendan tunnilin er, so átti samgongan at brúkt vanligt vit og skil og og um ikki annað so borað sjalvan tunnilin ígjøgnum, um ikki ráðini eru til at gera allan tunnilin lidnan.

Tað frættist annars nú, at í samband við gerð av Øravik –Hovstunnlinum eru sneiddur somikið vesturyvir at tað eru smáir 800 m úr hesum tunnlinum til nærmasta íbindandi vegalið til Fámjins, so kanska skuldi verið umhugað at gjørt ein síðutunnil vesturyvir til Fámjinsvegin?. Tað eigur straks at hyggjast at hvat hetta vildi kostað.

**Uppgraderingar og lúkan av trygdarkrøvum og viklíkahaldið av**

Hvalbiartunnilin, Sandvíkstunnilin og Sumbiartunnilin:

Hvalbiartunnilin, sum var fyrst gjørdi tunnil í Føroyum og harvið eisini ein av teimum gomlu tunnlunum, sum ikki er gjørdur til teir normar sum ídag eru kravdir fyri tunnlar í hædd ,breidd, ljós,bruna og ferðslutrygd osfr. eigur at verða uppraðfestur í samband við viðlíkahald og eigur at verða havt í hugað antin at fáa tunnilin hækkaðn og breiðkaðan so at vanlig lastbila -og bussferðsla kann ferðast gjøgnum hann - ella alternativt verður gjørd ein kostnaðarmetan av hvat er bíligari at gera nýggjan tunnil ella víðka núverandi.

Tað hevur í mong ár verið ein stórur trupuleiki fyrir t.d fiskaflutningin úr Hvalba at tunnilin ikki hevur havt neyðuga hædd fyri lastbilar.

Sandvíkstunnilin er í sama bási sum hvalbiartunnilin og eigur eisini at verða uppraðfestur í smb.við viðlíkahald. Sí talvu.

**Sumbiartunnilin:**

Sí talvu.

Hesin tunnil er ongantíð gjørdur liðugur og er neyðugt at fáa hann gjørdan so hann líkur trygdarkrøvini.

Har er m.a. onki ljós og hendir ein vanlukka so er onki samband og ongar neyðtelefonir.

Sjálvur koyribreytin hevur harliga brúk fyri at blíva asfalterað skjótast.

Viðlíkahalds raðfestingin fyri tunnlarnar ørkymlar:

Tað ørkymlar ikki sørt meg sum tingmann fyri Suðuroynna at síggja at t.d. Gásadalstunnilin fær allar neyðugar installatiónir og verður gjørdur heilt liðugur eftir forskriftunum, alt meðan bæði Hvalbiar og Sumbiartunnilin sum hava nógva dagliga ferðslu, liggja sum eitt skendsil fyri infrakervið og føroyska tunnilsgerð.

Hetta ber snøgt sagt ikki til og skal raðfestast fremri enn nú er gjørt.

Eitt gott infrakervið er ein av teimum mest umráðandi faktorum fyri trivnaði og livilíkindum bæði sosialt og vinnuliga á útoyggj, karmarnir mugu verða tryggir og eiga vit at raðfesta neyðugu upphæddirnar á fíggjarlógini til hetta økið.

Politiskt eiga hesir oman fyri nevndu tunnlar at raðfestast frammarliga og væl meira frammaliga enn teir eru í løtuni.

Teir politikarar sum beinleiðis og óbeinleiðis hava tilknýti til Suðuroynna á løgtingið eiga saman við restini av ting- og samgongumanning, at virka fyri at omanfyri nevnda verður framt í verkið.

**FÁMJINSTUNNILIN**

1. Fólkatal og broytingar :

| *1. januar* | **1985** | **1990** | **1995** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fámjin | 127 | 126 | 125 | 116 | 111 | 113 | 110 | 110 | 114 | 117 |

Fólkatal:

| *1. januar* | **1985** | **1990** | **1995** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Hvalbiar Kommuna* | 828 | 836 | 786 | 776 | 762 | 763 | 767 | 770 | 778 | 762 |

Fólkatal í Sumbiar sókn: Sumba, Lopra og Akrar:

| *1. januar* | **1985** | **1990** | **1995** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Sumbiar sókn* | 542 | 515 | 453 | 403 | 407 | 433 | 428 | 410 | 390 | 381 |

**Sjálvsognarstovnurin ALV**

**Alv søkir eftir 2-3 fólkum til nýggju sølubúðina á Vaglinum, Tórshavn.**

Eftir ætlan letur sølubúðin upp aftur í oktobur undir heitinum »Handil og Kaffi«. Umframt sølu av framleiddum lutum frá ALV verkstaðnum og frá fólkum runt um landið, verður eisini skipað fyri sølu av ymiskum sløgum av vælbryggjaðum kaffi.

**Vit ynskja at**

- Tú ert skjót/-ur, rólig/-ur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum tú er fyrikomandi og hevur sans fyri at samskifta við kundan
- Tú hevur áhuga og royndir innan handil og servering og er sinnaður at læra nýtt
- Tú dugir at tosa danskt og enskt
- Tú hevur kunnleika til handgjørdar vørur.

**Arbeiðsviðurskiftir**

Eftir ætlan verður handilin opin allar dagar í vikuni frá kl. 10.00 til 22.00. Sunnudag frá kl. 14.00 til 22.00. Talan verður helst um størv niðursetta tíð, ið eru vælegnaði til tín, ið hugsar um eitt léttari starv.

Størvini verða at byrja umleið 6. oktober 2006 ella skjótast gjørligt.

Meira fæst at vita við at venda sær til Óluvu Hermansen, leiðara á tlf. 513385.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 29. septembur 2006.

**Sjálvsognarstovnin ALV**

Boks 301

110 Tórshavn

SINNISBATI

# Skeið um Recovery

Altjóða psykiatridagin 10. oktobur skipa Økispsykiatriin/Psykiatriski depilin og Sinnisbati fyri skeiði um Recovery, sum merkir ein møguleiki at koma víðari.

Skeiðið verður hildið í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum.

Skeiðhaldarar eru Karin Dyhr og Jan Nielsen.

Karin Dyhr hevur verið innløgd meira enn 70 ferðir. Sjálv sigur hon, at hetta er úrslitið av tí seksuella misbrúkinum av henni gjøgnum allan barndómin.

Jan Nielsen er sjúkrarøktarfrøðingur og var deildarleiðari á deildini har Karin var innløgd. Hann var hennara terapeutur í meira enn 10 ár.

Tú kansk fáa meira at vita um evnið á www.glaspigen.dk

Meira um skeiðið fæst at vita á www.lsh.fo ella á tlf. 30 45 00 lokal 4170 ella 4021.

Tilmelding á sinnisbati@sinnisbati.fo seinast 3. oktobur 2006. Tilmeldingin er bindandi.

Prísur fyri skeiðið er kr. 1.200,- og skal gjaldast við tilmelding á konto nr. 9181-1469438.

**Økispsykiatriin/Psykiatriski depilin og Sinnisbati**

# Kunngerð

um framløgu av broytingaruppskoti av býarskipan og byggisamtykt fyri Nes kommunu.

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 av 21. mai 1954 við seinni broytingum, hevur kommunustýrið á fundi hin 21. juni 2006 samtykt at gera broytingar í býarskipanina og byggisamtyktina fyri Nes kommunu.

**Nes**

Broytingin á Nesi umfatar nýtt C4-øki á matr. nr. 56 og nýtt D5-øki á matr. nr. 155, sunnan fyri matr. nr. 56 Nes bygd.

**Toftir**

Broytingin á Toftum umfatar nýtt B-øki á matr. nr. 264a og nýtt B-øki sum umfatar matr. nr. 409, 410, 412, 367 og 375a og eitt nýtt D2-øki ið umfatar matr. nr. 304, 410, 411, 413, 415a, 367 og 376a.

Broytingarnar eru lýstar við litaðum kortum og uppsløgum, sum eru til skjals á Teknisku deild á kommunuskrivstovuni í vanligu upplatingartíðunum frá 20. september til 11. oktober 2006.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 20. desember 2006.

**Nes Kommuna**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo